


## Dýrt at sleppa stjóranum

Fyri nøkrum døgum síðani boðaði Fionia Bank danska fíggjareftirlitinum frá, at bankin var komin í slíka trongstøðu, at hann mátti fáa hjálp fyri at halda fram við sínum virksemi. Nú skrivar Berlingske Tidende, at stjórin í bankanum, Finn B. Sørensen, bað um at verða loystur úr starvinum fyri fýra mánaðum síðani. Samstundis avdúkar blaðið, at ein gamal sáttmáli millum stjóran og bankan tryggjar Finn B. Sørensen 7,8 milliónir krónur í fráfaringarsamsýning umframt 2,9 milliónir krónur í løn og pensjón og 400.000 krónur í bonus. Tilsamans fær hann sostatt 11 milliónir krónur við sær.

# alarar

ógvuliga umráðandi, at vit ikki fáa sjúku inn aftur í føroyska aling umvegis innflutt rogn.

– Tað er nakað, vit fyri alt í verðini mugu tryggja okkum ímóti. Og nú tá ein aliráðstevna verður her fríggjadagin, verður hetta uttan iva eitt av málunum, ið verða viðgjørd. Tað er umráðandi, at karmarnir – eisini tá sjúku umræður – eru so tryggir sum gjørligt, sigur Jóhan Dahl.

### Avmarkingar burtur

Tá alivinnan í sínari tíð tók seg upp í Føroyum, vildi Guð og hvør maður gerast alari. Men tá sjúkan av álvara fór at gera um seg, fóru fleiri alibrúk av knóranum, og talið á eindum minkaði, samstundis sum brúkini vuksu í vavi. Og tað hóvar landsstýrismanninum væl.

– Tað er gott, at alivinnan er komin á færri hendur. Fyri tað fyrsta er lættari at hava eftirlit við vinnuni á tann hátt, og fyri tað næsta fær tú nógv størri burðardygd í raksturin. Verður hugt eftir vinnuni í heimshøpi, eru vit jú ógvuliga smáir, og 50.000 tons er einki at tosa um í altjóða høpi, sigur Jóhan Dahl.

Hann hevði tí einki havt ímóti, at eindirnar kundu gjørst enn størri.

– Eg fyri mítt viðkomandi vildi mælt til, at tað als eingin avmarkming var á, antin tað var ein stór eind, ella kanska tvær ella tríggjar. Vit eru á veg í tingið við einari nýggjari alilóg, har nevndin, sum hevur sitið og viðgjørt spurningin um nýggja alilóg, mælir til, at markið fyri ognarskapi verður hækkað úr 25% upp í 50%, sigur Jóhan Dahl.

Hann leggur tó aftrat, at tað verður ein politiskur spurningur um, hvørt hetta fer at bera á mál, og tað má so tingið avgera, tá tað kemur hartil.

– Men mín persónliga meining – og eg meti meg hava rímiliga gott innlit í hesa vinnuna eisini – er, at tað átti at verið heilt frítt, sigur Jóhan Dahl.

Landsstýrismaðurin heldur saman um tikið, at framtíðin hjá føroyskari alivinnu sær rættiliga bjørt út.

– Vit hava í dag loyvi til at vaksinera laks og tað, sum verður framleitt, og tað haldi eg er gott. Vit eru í dag tað landið, sum alir best, og tað er eitt ógvuliga positivt tekin. Vit hava skipanir, sum eru ótrúliga góðar, bæði tá tað viðvíkur eftirliti og alibrúkunum, har teir sjálvir kunnu halda eftirlit við bæði sær sjálvum og hvørjum øðrum, sigur Jóhan Dahl.

Hann vísir eisini á, at vit sum er onga sjúku hava at stríðast við, samstundis sum tað hoyrist um sjúkur aðrastaðnis frá.

– Kili hevur sjúkur at dragast við, sama er galdandi í Skotlandi, Noregi og Hetlandi, so megna vit at sigla millum skerini har og sleppa uttan um sjúkurnar, so haldi eg vit eru væl fyri í alihøpi, sigur Jóhan Dahl.

Hann sigur, at vit hava dugnaligar alarar og framleiðarar av øllum tí, sum skal nýtast til alivinnuna, eisini innan fóðurframleiðslu.

– Vit skulu jú alla tíðina menna alivinnuna, og tað næsta, vit skulu hyggja eftir, er møguleikin fyri at ala úti á opnum havi, har viðurskiftini eru harðbalin og krevja serliga góða útgerð. Og har veit eg, at Havbúnaðarfelagið og alararnir eru áhugaðir í at fáa hugt nærri eftir hesum. Tað haldi eg ljóðar ógvuliga áhugavert og eg vóni, at hetta er nakað, sum verður hugt nærri at av alarunum og av myndugleikunum eisini, og at vit saman fáa hetta at virka, sigur Jóhan Dahl, landsstýrismaður í alimálum.



*Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, er eisini landsstýrismaður í alimálum. Hann sær eina bjarta framtíð í vinnuni, megna vit at sigla millum skerini og sleppa undan sjúkum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*